# Elsti katedralur í Noregi

Byrjað varð at byggja dómkirkjuna í Stavanger í byrjanini av 1100-talinum. Hon er tí elsti katedralur í Noregi, bygd úr klebersteinum. Tað var Reinald biskupur, sum kom úr Winchester í Onglandi og sum fyrst bygdi ein katedralskúla, ið varð liðugur í árinum 1125. Hetta er eisini árið, tá býurin varð grundaður. Í 1272 rakti herviligur eldsbruni Stavanger, og fekk dómkirkjan stóran skaða. Seinni bygdi Arne biskuppur dómkirkjuna uppaftur. Í 1682 avgjørdi Christian 5. kongur at flyta bispasætið til Kristiansand. Men tá Stavanger fyltir 800 ár, í 1925 vígdi Haakon 7. Jacob Christian Petersen sum fyrsta biskuppin í Stavanger seinastu 250 árini.






















